Álit

í

løgtingsmáli nr. 76/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Øktur barnafrádráttur)

Beinir Johannesen og Bárður á Steig Nielsen, løgtingsmenn, hava lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 20. apríl 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum saman við Taks.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hava hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at økja barnafrádráttin, so at frádrátturin fyri børn undir skúlaaldur hækkar við 2.000 kr. um árið, og frádrátturin fyri børn frá 7 til 17 ár hækkar við 1.500 kr. um árið. Sambært uppskotinum skal broytingin fáa virknað frá 1. januar 2023, so hon er galdandi fyri alt árið, og útreiðslan fyri landskassan verður mett at vera umleið 23 mió. kr.

Orsøkin til uppskotið er príshækkingar og viljin at veita barnafamiljum ein lætta.
Meirilutin ásannar, at fíggjarliga støðan hjá mongum barnafamiljum er vorðin trongari, nú stórur prísvøkstur á upphiting og gerandisvørum eyðkendi alt seinasta árið. Nevndin viðurkennir eisini, at barnafrádráttur er eitt amboð at náa barnafamiljum við einum lætta.

Tó hevur eitt samt Løgting fyri stuttum samtykt ein hjálparpakka við 12.000 kr. í hjálparískoyti til húski, sum forvinna minni enn ásetta upphædd og hækking av familjuískoyti við 750 kr. fyri hvørt barnið um mánaðin frá 1. juli og restina av 2023. Samgongan legði hetta uppskot fram júst fyri at lætta um hjá sperdum húskjum.

Harafturat arbeiðir samgongan við einum skattalætta til lág- og miðallønt, sum eftir ætlan skal koma í gildi hin 1. januar 2024, eins og lønarlyft fyri láglønarbólkar innan umsorganarøkið ætlandi skal bøta um fíggjarstøðuna hjá fleiri.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hava hesar viðmerkingar:

Alheimsstøðan í dag er merkt av príshækkingum og eisini í Føroyum. Hetta merkist í gerandisdegnum hjá borgarum, serliga familjunum, ið merkja sviðan av prísvøkstrinum á gerandisvørum.

Tá undanfarna samgonga legði fíggjarlóg fram seinasta heyst, var ein øktur barnafrádráttur eisini borin tinginum, tí man metti, at tørvur var á tí, sum støðan var.

Barnafrádráttur er eitt gott amboð at lætta um, tí tað rakar breitt, og hevði tað lætt um hjá familjunum, ið merkja príshækkingarnar á gerandisvørunum.

Tørvurin var seinasta heyst, og er hann ikki blivin minni síðan. Tí metir minnilutin, at tað er av stórum týdningi, at hetta verður gjørt.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 28. apríl 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Hanna Jensen
Eirikur í Jákupsstovu	Bjarni Hammer	Steffan Klein Poulsen
	Magnus Rasmussen	